

# Oljufólk læra føroyskt

**Hjá BP halda tey tað vera sera umráðandi, at fólk teirra, sum skulu arbeiða við føroyskum viðurskiftum, eru væl kunnað um føroyska samfelagið, søgu og mentan, og her inngongur undirvísing í føroyskum máli tí sum ein týðandi partur.**

OLJA OG MENTAN
*Jan Müller*

Nú nærkast fyrstu leitingini eftir olju og gassi á føroyska landgrunninum eru oljufeløgini farin undir fyrireikingarnar, og er ein partur av hesum fyrireikingum kunnleiki til føroyska samfelagið, mál og mentan. Føroyski stjórin hjá BP, Hjarnar Djurhuus setti sær longu tíðliga sum málsetning at upplýsa útlendsku oljufeløgini um føroyska samfelagið og mentan og at læra tey so frægt av føroyskum, at tey kunnu samskifta við føroyingar og fylgja við í fjølmiðlunum.

Fyrsta stigið varð ein samfelagslig kunning, har Jógvan Mørkøre frá Fróðskaparsetrinum greiddi frá um føroysk viðurskifti. Síðani hevur Tórður Jóansson, doktari undirvíst útlendsku oljufólkunum. Tórður, sum í løtuni starvast í Glasgow, ferðast javnan til Aberdeen, har hann undirvísir í føroyskum máli og annars greiðir oljufólkunum frá føroyskari mentan, siðmenning og søgu. BP-fólkini hava umleið 4-6 undirvísingartímar um vikuna og sjálvur heldur Tórður, at tey fáa væl burtur úr. Hann hevur sjálvur lagt undirvísingartilfarið til rættis, nú slíkt ikki finst sum er. – Eg haldi, at hetta er skilagott tiltak, sum leiðslan í BP hevur tikið stig til, og haldi eg fólkini longu hava lært eini 500 føroysk orð hesar tríggjar fyrstu fríggjadagarnar eg havi undirvíst teimum sigur Tórður Jóansson.

Í løtuni er Tórður í Føroyum, har hann undirvísir oljufólkum á BP-skrivstovuni á Skansavegnum. Talan er m.a. um tey fólkini, sum skulu taka sær av uppgávum í sambandi við 1. boringina í summar. Eitt av fólkunum er sjálvur boristjórin, John Thorogood, sum letur sera væl at undirvísingini. Sjálvur hevur hann arbeitt og búð í nógvum londum og hevur hann altíð roynt at læra seg málið í teimum ymsu londunum. – Við at læra málið ber til at fáa betri innlit í, hvat fólkið á staðnum hugsar um hesa vinnuna, og fyri okkum, sum skulu arbeiða í vinnuni, hevur tað nógv at siga at vita, hvat lokalfólkið hugsar. John Thorogood heldur tað eisini vera rættiliga áhugavert at merkja sær, at nógv av orðunum í Noregi, Skotlandi og Føroyum líkjast og ganga aftur.

Sjálvur sær hann tað sum eina sera stóra avbjóðing at hava fingið hesa uppgávuna í Føroyum og hann heldur seg eisini vera best føran fyri at útinna sína uppgávu við at verða væl kunnaður um mest møgulig føroysk viðurskifti. Sjálvur vil hann fegin sleppa at fylgja við í bløðunum og annars í loftmiðlunum. Hann hevur annars roynt at tikið til sín tað, sum er umsett til enskt av føroyskum bókmentum, og her m.a. bókina Barbara.



*Frá undirvísingini í føroyskum máli fyri oljufólkum hjá BP í Havn. Tórður Jóansson stendur fyri undirvísingini.*
*Mynd Jens K. Vang.*



# Brot á víkiskyldu fyri rættin

FERÐSLA
*Ferðslutrygd*

Nýggja ferðslulógin heimilar í stóran mun løgregluni at taka koyrikortið frá førara, sum fremur brot á ferðslulógina, á staðnum, og krevja at viðkomandi møtir á Bileftirlitinum til eftiransandi koyriroynd.

Men hetta er ikki galdandi, tá talan er um brot á víkiskyldur, og skaða, sum stendst av hesum. Tá verður frágreiðing skrivað og fútin leggur málið fyri rættin. So kann rætturin døma viðkomandi til eftiransandi koyrroynd, um t.d. talan bert er um materiellan skaða í sambandi við brotið. Tann, ið kemur út fyri slíkum, varðveitir koyrikortið, til rætturin hevur talað.



*Savnsmynd*

# Myrkakoyring skal avgreiðast

FERÐSLA
*Ferðslutrygd*

M.a. tey, sum taka koyrikortið um summarið, verða biðin um at møta seinni til roynd í myrkakoyring. Hetta kann taka eitt sindur av tíð at fáa avgreitt, tí talan er um prioritering hjá Bileftirlitinum, sum hevur sera nógv at gera. Í farnu viku varð spurningur alment settur fram, hvat hendir við einum, sum ikki møtir til roynd í myrkakoyring, og ikki skjalprógvar hetta til ásetta tíð sambært kravinum frá Bileftirlitinum. Svarið er sera einfalt. Talan er um eitt krav sum skal fylgjast, annars er koyrikortið ikki fulltikið. Alt eftir arbeiðsorkuni hjá Bileftirlitinum fær løgreglan boð sohvørt, hvørji ikki eru møtt og hava skjalprógvað myrkakoyringina til ásetta tíð, og løgregluni er stutt og greitt álagt at taka koyrikortið frá teimum, til myrkakoyringin er skjalprógvað mótvegis Bileftirlitinum.

# Fyrstahjálp kravt til koyrikort

FERÐSLA
*Ferðslutrygd*

Eitt grundskeið í fyrstuhjálp tekur bert 12 tímar. Í seinastuni hava bæði løgreglumenn og fólk innan sjúkraflutningstænastuna víst á, at bert heilt lítil kunnleiki til fyrstuhjálp kann, og hevur í fleiri førum, bjargað mannalívum.

Jógvan Jensen, ið stendur fyri útbúgving og skeiðvirksemi hjá ambulansutænastuni, ivast ikki: 95% av teimum ungu yvir 18 ár í dag taka koyrikort, og høvdu hesi samstundis fingið skeið í fyrstuhjálp, so hevði gingið sera stutt tíð, til at kalla øll dugdu fyrstuhjálp.

# Danir seta ferðina upp

FERÐSLA
*Ferðslutrygd*

Danir fylgja ikki í løtuni grannalondunum í ferðaásetingum. Frá 1. mai verður loyvt hjá lastbilum og persónbilum við kampingvognum at koyra 80 km/t. Hægst loyvda ferð hevur higartil verið 70 km/t, og tosað hevur enntá verið um at seta ferðina niður. Men nú hevur Jacob Buksti, ferðslumálaráðharri, avgjørt, at ein roynd skal gerast í 2 ár við at hækka ferðina. Men samstundis verður eftirlitið nógv strangari, og nevndu akfør fáa yvirhálingsbann á sera nógvum økjum. Hægst loyvda ferð fyri vanligar persónbilar uppá 110 km/t verður óbroytt.

# Trygdin drepur trøini

FERÐSLA
*Ferðslutrygd*

Vegdeildin hjá Tórshavnar Kommunu má av og á koyra salt á vegirnar av trygdarávum. Men fólk klaga um, at har, sum saltið rennur inn í urtagarðar, doyggja trøini.

Leiðarin á Skógrøkt Landsins, Tróndur G. Leivsson, sigur, at tey kenna nøkur dømi um hetta. Hann mælir til, at kommunan heilt fer burtur frá at brúka salt, og ístaðin bert brúkar laka. Kanningar í grannalondum vísa, at lakin ger somu ella betri nyttu enn saltið, men mundi minni av salti verður brúkt til laka, enn tá bert salt verður brúkt. Annars ber til at spula trøini við reinum vatni, tá salt er komið inn í garðin, men hetta er nyttuleyst, tá skaðin er hendur.

